LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

Fylgiskjal 3

Ummælisskjal

Ummæli er komið frá Føroya Rætti, Føroya Landfúta, Umhvørvismálaráðnum, Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum, Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, Almanna- og mentamálaráðnum, Heilsumálaráðnum, Vinnuhúsinum, Etiska Ráðnum, MEGD, Amnesty International Føroyar og Brotsfrøðifelag Føroya.

Umhvørvismálaráðið, Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið, Fíggjarmálaráðið, Uttanríkis- og vinnumálaráðið, Heilsumálaráðið og Vinnuhúsið høvdu ongar viðmerkingar til uppskotið.

Almanna- og mentamálaráðið hevur yvirskipa ikki viðmerkingar til uppskotið ella til ásetingarnar í kap. 9, har talan er um annan dóm enn til revsing, tað er m.a. tá fólk verða dømd til eftirlit ella fyriskipan í Almannaverkinum.
Í mun til ásetingina í § 74 a, kann ivi vera um, hvør stovnur og stjórnarráð varðar av hesi áseting, nú Barna- og útbúgvingarmálaráðið varðar av løgtingslóg um barnavernd.

Løgmálaráðið hevur tikið viðmerkingina hjá Almanna- og mentamálaráðnum viðvíkjandi § 74 a til eftirtektar, og broytt "*landsstýrismaðurin í almannamálum*" til "*landsstýrið*".

MEGD fegnast um, at hoyringartíðin var meiri enn 5 vikur, umframt at ein hoyringarfundur varð skipaður, har limafeløg kundu luttaka.

MEGD mælir til, at Revsirættarráðið og onnur viðkomandi ráð og nevndir, verða mannað við minst einum umboði, ið hevur serkunnleika til bæði brekviðurskifti og revsirætt.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at Revsirættarliga Ráðið er mannað við fólkum, sum hava praktiskar royndir innan revsirætt og ongan formliga støðu hava. Revsirættarliga Ráðið er ætlað at ráðgeva landsstýrismanninum og aðalráðnum viðvíkjandi revsirættarligum spurningum.
Løgmálaráðið roynir hinvegin altíð at draga MEGD uppí arbeiðið við revsilógina við at hava hoyringsfundir og altíð at senda uppskot til hoyringar.
Tá ið arbeiðið við at gera eina føroyska revsilóg vónandi verður sett í gongd, er ætlanin at seta ein revsilógarnevnd við breiðari umboðan úr føroyska samfelagnum. Tá hugsar Løgmálaráðið, at MEGD er ein sjálvsagdur partur í einari tílíkari nevnd.

MEGD mælir til, at viðkomandi fyriskipanir ella tilboð sambært revsilógini, eitt nú samfelagstænasta, útslúsing og útbúgvingar, verða tillagað á hóskandi hátt, soleiðis at javnbjóðis atkoma kann bjóðast til øll, uttan mun til brek ella varandi sjúku.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at hetta hevur stóran týdning at hava í huga, í samband við at ein møgulig nýggj revsilóg verður smíðað.

MEGD mælir í samband við § 16 til, at tað altíð eru serfrøðingar ella umboð, sum hava nøktandi vitan og kunnleika til fólk, ið bera brek, sum gera metingar, ið beinleiðis eru viðkomandi fyri hesi fólk. Víst verður samstundis á, at málburður og orðfeingi hava grundleggjandi týdning fyri almenna hugburðin til hugtøk sum brek og varandi sjúku. Í sama høpi vónar MEGD, at fakligar ella tekniskar metingar hjá viðkomandi pørtum, eitt nú Retslægerådet, hava virðing fyri, at føroyska revsirættarøkið kann verða ørðvísi enn danska revsirættarøkið, og at viðkomandi atlit verða tikin til føroyingar, ið bera brek, kunnu vera verri stillaðir, eitt um mál, karmar ella tænastur eru í Danmark ella á donskum máli.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at metingar eftir § 16, altíð verða gjørdar av rættarpsykiatarum. Løgmálaráðið skal somuleiðis gera vart við, at orðingar í eitt nú § 16 og §§ 68 – 74 eru revsi- og brotstekniskar, og skulu staðfesta støðuna hjá einum persóni, sum verður metur at vera ósaknæmur (utilregnelig) og tí ikki kann revsast. Løgmálaráðið er samt við MEGD í, at málburður og orðfeingi hava grundleggjandi týdning fyri almenna hugburðin. Løgmálaráðið hevur hetta tí altíð í huga. Í ávísum førum er tó talan um rættartrygd, og neyvleiki í málinum er í hesum førum avgerandi. Í hesum førinum er talan um kliniskar orðingar, sum eru neyðugar, fyri at meta um, hvørjar avleiðingar eitt álvarsligt lógarbrot skal hava.

Løgmálaráðið er samt við MEGD í, at føroyingar yvirhøvur, og serstakliga føroyingar, ið bera brek, kunnu vera verri stillaðar, um tey noyðast til Danmarkar at sita, antin í fongsul ella á stovn. Løgmálaráðið vónar at nýggja samstarvsavtalan, sum er gjørd millum Kriminalforsorgina, Almannaverkið og Rówt (Megna títt Lív) fer at bøta um hesi viðurskifti. Samstundis vónar Løgmálaráðið, at nýggja fongslið, sum fer at vera bygt, fer at hava við sær, at føroyingar í flestu førum, kunnu sita revsing í Føroyum.

MEGD mælir til, at ein almenn løgfrøðilig orðabók- ella listi verður skipaður í Føroyum. MEGD metir, at hetta hevði styrkt grundarlagið undir øllum løgfrøðiligum arbeiði í Føroyum, og at hetta eisini hevði verið gott fyri rættartrygdina.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at Løgmálaráðið er samt við MEGD í hesum. Í samband við arbeiðið við revsilógina, hevur Løgmálaráðið gjørt ein lista við góðkendum revsirættarligum orðum, sum verður dagførdur og lagdur við uppskotinum, tá tað verður lagt fyri Løgtingið. Løgmálaráðið metir tó, at ein løgfrøðilig orðabók eigur at gerast á Fróðskaparsetrinum í samstarv millum løgfrøðingar og málfrøðingar. Hetta kundi hóskandi verið tikið við, í samband við at farið verður undir eina nýggja føroyska revsilóg.

MEGD vísir á, at tey háttaløg, ið verða brúkt til at diagnostisera brek ella varandi sjúkur í ávísan mun taka støði í fortreytum, vitan og kunnleika um mannfólk. Hetta kann hava við sær, at vitan um kvinnur kann verða avmarkað í mun til diagnostisering. MEGD vísir samstundis á, at ein grundleggjandi partur av revsilógini byggir á tekniska vitan um støðuna hjá fólki, herundir um tey bera brek ella hava eina sjúku. Hetta kann hava við sær, at kvinnur verða fyri mismuni og tí fáa eina órímuliga harða revsing.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at hetta er ein trupulleiki, sum tað í løtuni verður varpað meira og meira ljós á í altjóða granskingarhøpi. Av tí at hetta framvegis er felagsøki, er tað tó torført at gera nakað við hendan trupulleika í verandi løtu. Hetta er eitt øki, sum kundi verið kannað nærri, tá ið farið verður undir eina nýggja revsilóg.

LM-016/2023

MEGD ger eisini vart við, at tað er neyðugt hjá feløgum, ið umboða fólk, ið bera brek, at hava góða atkomu til vitan um viðkomandi revsirættarmál og rættarpraksis, hetta kundi eitt nú verið leitigrunnar, netportalar, almen álit og tílíkt.
Samstundis ger MEGD vart við, at tað er neyðugt at hava eitt dygdargott og vælskipað eftirlit við revsirættaligum viðurskiftum. Hetta kundi eitt óheft og uttanveltað eftirlit sambært grein 33 í altjóða brekrættindasáttmálanum staðið fyri.
Somuleiðis eftirlýsir MEGD skipaða hagtalsinnsavning.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at sum ráðið hevur skilt, verður eitt brekumboð sett í næstum. Hetta umboð kann vera við til at stuðla undir, at amboð vera ment, sum kann stuðla undir rættartrygdina hjá borgarum, ið bera brek. Hetta kundi eitt nú verið leitigrunnar og hagtalsinnsavning.

Etiska Ráðið fegnast um, at revsilógin nú øll verður á føroyskum. Hetta ger tað lættari hjá borgarum í Føroyum at skilja tekstin. Etiska Ráðið fegnast somuleiðis um, at teksturin í tann mun tað er gjørligt, er tillagaður til føroysk viðurskifti.

Etiska Ráðið ger somuleiðis vart við, at tað er gott, at tað hevur verið skipað fyri fleiri ummælisfundum og at man hevur roynt at inndraga so nógv sjónarmið í tilgongdini.

Etiska Ráðið tekur undir við teimum broytingum, sum verða gjørdar í samband við dagføringina.

Etiska Ráðið metir, at tað er gott, at tað framyvir altíð skal ásetast revsing, tá ið tað verður dømt treytað fongsulsrevsing. Etiska Ráðið grundgevur hetta við, at ein persónur, sum verður dømdur fyri eitt lógarbrot, eigur at fáa at vita alt fyri eitt, hvør revsingin fyri brotið er. Somuleiðis metir Etiska Ráðið, at hin dømdi eigur at dømast fyri brotsverkið dómurin er fallin er um, ikki eitt brotsverk, ið er framt seinni.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at serligu viðmerkingarnar í ávísan mun eru tillagar viðmerkingina hjá Etiska Ráðnum.

Etiska Ráðið fegnast um møguleikan fyri økta nýtslu av samfelagstænastu, har tað annars hevði verið nýtt treytaleys fongsulsreving. Etiska Ráðið ger vart við, at tað vísindaliga er ógvuliga greið semja um, at rehabilitering loysir seg munandi betri enn fongsulsrevsing. Havandi í huga, at fangar við longri revsingum sita revsingina í Danmark, metir Etiska Ráðið, at hetta helst ger seg í uppaftur størri mun galdandi í Føroyum, tí fangarnir hava avmarkað sambandið við føroyskar myndugleikar, føroysk viðgerðartilboð og familju í Føroyum. Etiska Ráðið metir somuleiðis av somu orsøkum, at sannlíkindini fyri, at fangar sum sita revsingina í Danmark, fara aftur í somu gomlu mynstrini aftur, tá teir koma aftur til Føroya.
Etiska Ráðið vísir eisini á, at tað eru fleiri dømi um, at fyrrverandi fangar hava tikið sterk sambond til donsk kriminell umhvørvi við heim til Føroyar.

Etiska Ráðið metir, at tað eru væl betri fortreytir fyri, at fólk, ið verða dømd, kunnu rehabiliterast, um tey verða dømd at gera samfelagstænastu í Føroyum, og samstundis fáa dygdargóð tilboð og hjálp til at koma á rætta leið aftur.

Samstundis ger Etiska Ráðið vart við, at atlit eisini má takast til rættvísiskensluna hjá fólki. Um talan er um brotsverk, har persónar hava gjørt seg inn á ein annan, er týdningarmikið, at tann órættaði følir, at revsingin er samsvarandi við brotsverkið, annars kann hetta skapa misálit á skipanina.

Tað eigur tí at grundgevast væl fyri, hví broytingin verður framd. Etiska Ráðið skjýtur upp, at skipa verður fyri einum átaki ella eini ráðstevnu, har kjakast verður um rehabilitering mótvegis frælsistøku, týdningin av at fólk kunnu geva aftur til samfelagið og – tó at tað etiskt kanska hevur minni týdning – hvussu nógv bíligari tann loysnin er fyri samfelagið.

Etiska Ráðið ger vart við, at í einum lítlum samfelagi, sum tað føroyska, hevur tað eyka stóran týdning, at leggja dent á væl grundaðar revsingar, sum virka fyribyrgjandi frameftir.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at hetta alt eru atlit, sum eiga at havast í huga í samband við at tað møguliga verður sett gongd á at smíða eina føroyska revsilóg. Samstundis eru viðmerkingarnar viðvíkjandi samfelagstænastu í ávísan mun tillagar viðmerkingarnar hjá Etiska Ráðnum.

Til endans fegnast Etiska Ráðið um, at ætlanin er at fara undir at arbeiða viðari, og at smíða eina føroyska revsilóg, ið byggir á føroysk viðurskifti og umstøður. Etiska Ráðið metir, at hetta hevði verið ógvuliga gagnligt. Føroyska samfelagið er øðrvísi enn tað danska. Tað er minni kriminalitetur og minni álvarsamur kriminalitetur, og um sama mundið gera tøttu sambondini míllum fólk í Føroyum – og sterka sosiala eftirlitið – at umstøðurnar í Føroyum víkja nógv frá teimum donsku.

Etiska Ráðið vónar tí, at hetta arbeiðið verður raðfest av politiska skipanini.

Amnesty Føroyar fegnast um, at revsilógin nú er á føroyskum og tað í umsetingini er roynt at gera málið einfaldari og lógina lættari at lesa. Amnesty Føroyar vísur á, at tað hevur týdning fyri rættartrygdina og fólkaræðið í samfelagnum at allir bólkar í samfelagnum hava atgongd til lógirnar og skilja tær.

Amnesty Føroyar vísir somuleiðis á, at í uppskotinum verða orð sum sálarsjúka og sinnissjúka nýtt, umframt onnur líknandi orð. Víst verður á, at nógv stigmatisering er knýtt at sálarsjúku, og at ynskiligt er tí, at orðaval og málburður í lóggávu ikki er óhóskandi og við til at stigmatisera.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at Løgmálaráðið er tilvitað um, at málburður hevur stóran týdning og at samskift hevur tí verið við MEGD um ymisk orð. Samstundis er týdningarmikið í hesum høpi, at tað her er talan um ásetingar, sum hava týdning í samband við áseting av revsing og sum í summum førum hava við sær, at ein persónur ikki kann revsast vegna sinnissjúku.
Hetta hevur við sær, at tað er neyðugt at skilja ímillum "sinnissjúka" sum er eitt revsirættarligt og rættspsykiatriskt hugtak og sálarsjúkur í víðari merking. Hetta er eisini orsøkin til, at ymiskar orðingar verða nýttar í uppskotinum.

Amnesty Føroyar setur spurnartekin við, um tey tilboð og fyriskipanir, sum eru nevnd í uppskotinum, eru at finna í Føroyum. Heitt verður á, at atlit altíð verða tikin til fólk við serligum tørvum og førleikum og at neyðugu fyriskipanir verða mentar til hesar bólkar í Føroyum.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at Løgmálaráðið er tilvitað um, at tað er neyðugt at menna ymisk tilboð og fyriskipanir í Føroyum. Hetta verður serliga viðkomandi, tá ið nýtt fongsul er bygt í Føroyum. Einstakir fundir hava verið við Almanna- og mentamálaráðið og Barna- og útbúgvingarmálaráðið fyri at kortleggja, hvørji tilboð eru neyðug og realistisk at fáa sett gongd á. Neyðugt er, at hetta arbeiðið heldur áfram og verður meira ítøkiligt, soleiðis at vit eru klár við nøktandi tilboð og fyriskipanum, tá ið nýggja fongslið stendur klárt.

LM-016/2023

Amnesty Føroyar fegnast um, at stig verða tikin til at økja um samfelagstænastu og minka um frælsistøku. Amnesty Føroyar heldur, at frælsistøka eigur at vera nýtt sum minst, men er neyðug í teimum førum, har endamálið við revsingini ikki verður rokkið við aðrari revsing enn fongsulsrevsing. Rættindini hjá persónunum skulu altíð virðast og inntrivið í persónliga frælsið og onnur rættindi verða so lítil sum møguligt fyri at røkka endamálinum við revsingini.

Amnesty Føroyar vísir eisini á, at revsing hevur ymisk endamál, og at ein fongsulsdómur ikki av sær sjálvum tryggjar, at endamálið verður rokkið. Víst verður somuleiðis á, at um revsingin verður sett í verk í samfelagnum heldur enn uttan fyri samfelagið, kann hetta verða við til at verja samfelagið í størri mun. Fyriskipanir sum eitt nú avvenjing og útslúsingsfyriskipanir kann í nógvum førum verða meiri gagnligt fyri bæði samfelag og brotsfólk. Amnesty heitir tí á, at atlit verður tikið til gransking og vitan, undir hesum hagtalsinnsavnan. Mælt verður somuleiðis til, at revsirættarliga økið má lýsast gjølla, m.a. fyri at hava møguleika at fylgja gongdini á økinum og fyri at tryggja, at fongsling, samfelagstænasta og aðrar fyriskipanir rigga eftir ætlan.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at Løgmálaráðið er samt í, at tað bert eigur at revsast ta revsing, ið er neyðug og at revsingin í ávísan mun eigur at tillagast persóninum og umstøðurnar annars. Yvirskipa má høvuðsendamálið við revsingini verða, at stegða brotsverki og at hjálpa persóninum til eitt lív uttan kriminalitet.

Løgmálaráðið er eisini samt í, at vitan og gransking er neyðug, serliga í einum lítlum samfelag sum tað føroyska. Løgmálaráðið vantar, at um farið verður undir at gera eina nýggja føroyska revsilóg, so fer hetta at birta uppundir neyðuga gransking innan hetta økið.

Til endans fegnast Amnesty Føroyar um, at mælt verður til at smíða eina føroyska revsilóg, sum í størri mun kann taka atlit til føroyska samfelagið og samfelagsvirðurskiftini. Heitt verður samstundis á Løgmálaráðið um at tryggja, at grundarlagið undir øllum revsrættarliga økinum byggir á mannarættindi, og á eina vitan á økinum t.d. um fyribyrging av lógarbroti og afturfalli, umframt at tryggja bestu reintegratiónina av teimum, sum sita dóm. Heitt verður somuleiðis á Løgmálaráðið um at hugsa breitt og at allir viðkomandi stovnar verða tiknir við í arbeiðnum at smíða eina føroyska revsilóg, so økið verður sæð sum ein heild og fer tvørtur um greinar og geirar.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at um tað politiskt verður tikið undir við, at ein føroysk revsilóg skal smíðast, er ætlanin at taka viðkomandi partar við í arbeiðið at smíða ein føroyska revsilóg. Hetta er neyðugt fyri at tryggja, at lógin er grundfest og hevur undirtøku í føroyska samfelagnum og byggir á vitan um føroysk samfelagsviðurskifti.

Brotsfrøðifelag Føroya fegnast um, at tað verður hugsað um annað enn fongsul. Brotsfrøðifelagið heldur eisini, tað vera týdningarmikið at hugsa føroyskt á revsirættarøkinum. Tað eigur at verða hugsað um føroyska samfelagið, mentanina og at fáa brotsmenn endurmentar.

Brotsfrøðifelagið heldur samfelagstænastu vera eitt gott amboð, sum í størri mun fyribyrgir afturstigi (tilbagefald), Brotsfrøðifelagið ger tó samstundis vart við, at tey tilboð, sum sum skulu kunnu veitast, sum part av samfelagstænastuni, krevur at føroyska samfelagið kann bjóða tilboðini. Kriminalforsorgin hevur ikki tilboðini, men brúkar tey, ið finnast í samfelaginum annars.
Brotsfrøðifelagið vísir í hesum sambandi á, at rúsevnismisnýtslutilboðini eru avmarkað í Føroyum, eitt nú er ambulant viðgerð nærum ikki tøk í Føroyum. Tað finst eingin viðgerð fyri

spælióvógv í Føroyum og tað er heldur eingin kynslívsfrøðiliga viðgerð til pedofilar og skemmarar annars.

Neyðugt er eisini at hugsa um, at hendan viðgerðin má verða tøk um alt landið, soleiðis at viðgerðin kann vera reglulig og ikki krevur langa ferðing.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at kannast má nærri, hvussu tryggjast kann, at fleiri tilboð um viðgerð kunnu veitast í Føroyum. Løgmálaráðið hevur broytt viðmerkingarnar um figgjarligar og umsitingarligar avleiðingar samsvarandi hesum.

Brotsfrøðifelagið ger vart við, at samfelagstænasta er næstan líka hørð revsing sum treytaleyst fongsul. Samfelagstænasta má tí koma í staðin fyri treytaleysa fongsulsrevsing og ikki í staðin fyri treytaða fongsulsrevsing. Í verki verður tó mangan dømt til samfelagstænastu í sambandi við treytaðan dóm. Brotsfrøðifelagið heldur, at havast má í huga, at samfelagstænasta bert skal verða dømt, um hugsað verður um fongsul, men har samfelagstænasta verður mett at vera meir hóskandi revsing.

Brotsfrøðifelagið ger somuleiðis vart við, at samfelagstænasta kann hava við sær tvífalda revsing, tí tað kann geva kensluna av at vera útstillaður og stigmatiseraður. Samfelagstænasta er ikki lægst á revsingarstiganum, og tí eigur ein ikki at dømast samfelagstænastu fyrstu ferð. Treytað fongsulsreving er linari revsing og enn linari er at tosa um brotið andlit til andlits, og hetta er samstundis helst tað virknasta.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at hetta er eitt torført øki, og at ongar broytingar verða gjørdar í uppskotinum nú. Hinvegin eigur tað at kannast nærri, í samband við møguligari gerð av einari nýggjari føroyskari revsilóg, hvussu samfelagstænasta eigur at skipast í Føroyum.

Brotsfrøðifelagið metir, at broytingin sum ásetir, at tað framyvir altíð skal ásetast revsing við treytaðum dómi, kann enda við at herða revsingina. Brotsfrøðifelagið metir at treytað revsing uttan áseting av revsing er linari og at boðskapurin við broytingini verður herdur.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at tað longu í verki altíð verður ásett revsing við treytaðum dómi. Løgmálaráðið metir eisini, at tað er betri fyri tann dømda, at vita alt fyri eitt, hvat revsingin fyri brotið er, heldur enn at hetta er ein óvissa. Uppskotið verður tí ikki broytt hesum viðvíkjandi.

Brotsfrøðifelagið vísir á, at tað er umráðandi at hugsa um aðra revsing enn fongsulrevsing. Umframt samfelagstænastu verða hesir hættir nevndir:

- Semingsstevna (konfliktráð), sum Brotsfrøðifelagið metir hóskar væl í einum lítlum og tættum samfelagi sum í Føroyum.
- Heimafongsul, tað er fótfjøtur sum Brotsfrøðifelagið undrast á, ikki er komið til Føroya enn. Brotsfelagið metir, at heimafongsul er lagaligari revsing og at hetta eigur at kunna setast í verk í Føroyum. Samstundis heldur Brotsfrøðifelagið, at tað eigur at verða umhugsað, um avgerðin um heimafongsul skal vera fyrisitingarlig avgerð ella rættaravgerð.
- Ung – Brotsfrøðifelagið ger vart við, at ungum tørvar aðra revsing, um tey ikki skulu verða send niður. Tað er ikki møguligt at hýsa ungum brotsmonnum í Føroyum sum nú er, tí eigur at verða umhugsað aðra revsing til hesi, so tey ikki mugu sendast niður.

LM-016/2023

Løgmálaráðið skal viðmerkja viðvíkjandi semingsstevnu og ung at hetta má takast upp í samband við eini møguligari nýggjari revsilóg.

Viðvíkjandi fótfjøtur, so er ríksislógaruppskot gjørt, sum í næstum verður borið í Løgtingið og sum vantandi kemur í gildi 1. juli 2024.

At enda ger Brotsfrøðifelagið vart við, at tað eisini hevur týdning, hvussu sær út viðvíkjandi afturstig (recidivitet) aftan á fongsulsrevsing. Her hevur tað eisini ávísan týdning, hvat endamálið við revsingini er. Brotsfrøðifelagið vísir á, at í Danmark er endamálið við revsingini í stóran mun at forða brotsverki. Danmark hevur samstundis stórt afturstig. Noreg hevur hinvegin sum endamál at forða afturstigi. Hetta sæst aftur í, at Noreg hevur lægsta afturstigið.

Brotsfrøðifelagið vísir eisini á, at Ísland er farið at leggja størri dent á uppafturvenjing (rehabilitering) og mildari revsing. Hetta hevur havt góð úrslit í Íslandi.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at hetta Brotsfrøðifelagið vísir á, er ógvuliga áhugavert og eigur at vera eitt atlit, sum hugt verður nærri at, í samband við eini møguligari nýggjari revsilóg.

Føroya Landfúti ger innleiðandi vart við, at hann ikki hevur havt møguleika fyri at taka støðu til málsliga partin av uppskotinum. Føroya Landfúti ger síðan vart við, at hann hevur verið ivasamur viðvíkjandi orðingina av kapitli 2, sum m.a viðvíkur, hvussu revsimyndugleikin framyvir skal skipast, nú revsilógin er orðað á føroyskum.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at kapittul 2 er umrøddur við Justitsministeriet og við aðrar serfrøðingar og at uppskotið er tillagað í samráð við hesi.

Føroya Landfúti viðmerkir, at tað í § 10, stk. 4 verður nýtt orðingin "ákæruvaldið í Føroyum". Víst verður samstundis til § 129 í rættargangslógini, har tað framgongur, at ákæruvaldið fevnir um Ríkisadvokatin, statsadvokatin og landfútan. Føroya Landfúti mælir til, at tað í viðmerkingunum greitt framgongur, at "ákæruvaldið í Føroyum" skal skiljast soleiðis sum tað framgongur í § 129 í rættargangslógini.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at orðingin er nakað broytt eftir at hava umrøtt ásetingina við Justitsministeriet. Samstundis gongur tað nú greitt fram av viðmerkingunum til ásetingina, at hon skal skiljast soleiðis, sum tað framgongur av § 129 í rættargangslógini.

Føroya Landfúti mælir til, at § 26, stk. 1 og § 27, stk. 2 sum viðvíkja løgfrøðiligar persónar, verða umorðaðar soleiðis at ríkismyndugleikar eisini verða fevndir av ásetingunum.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at viðmerkingin hjá Føroya Landfúta er tikin til eftirtektar og ásetingarnar eru broyttar samsvarandi.

Føroya Landfúti ger vart við, at § 52 er strikað í donsku revsilógini, og mælir til at ásetingin eisini verður strikað í hesum uppskotinum, tí innkrevjing av sektum er nú flutt til Lov for Færøerne om fuldbyrdelse af straf.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at viðmerkingin er tikin til eftirtektar og § 52 er strikað.

Føroya Landfúti ger vart við, at í § 71 verður orðingin "hjálparverji" nýttur. Hetta er týðingin av hugtakinum "bistandsværge". Føroya Landfúti ger vart við, at "forsvareren" eisini verður

nevndur "verji" og at bland kann koma í hesi hugtøk. Mælt verður til at umhugsa, at finna annað heitið fyri "bistandsværge".

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at málið hevur verið umrøtt við Málráðið. Føroyska orðið fyri "værge" er "verji" og tað er tí ringt at koma uttanum hesa orðing. Samstundis er Løgmálaráðið varug við, at ymisk krøv eru til "verjan", sum er advokatur hjá ákærda og "bistandsværgen" sum er verji hjá hesum persóni, og har eingi krøv eru um útbúgving.
Persónar, sum eru fevndir av § 71, eru persónar sum kunnu verða dømdir at verða settir á stovn ella í trygdarvarðhald. Persónurin er ætlaður at stuðla ákærda undir málinum og framyvir um viðkomandi verður dømdur at verða settur á stovn.

Løgmálaráðið hevur avgjørt, at orðingin "bistandsværge" verður týtt til "stuðulsverji" tí ætlanin við hesum persóni er, at hann skal stuðla ákærda.

Føroya Rættur ger vart við, at tað ikki hevur verið møguligt at gjøgnumganga uppskotið málsliga, fyri at meta um hvørt týðingin er nøktandi.
Tað hevur heldur ikki verið møguligt hjá Føroya Rætti at gera ein nøktandi gjøgnumgongd av uppskotinum lógartøkniliga og innihaldsliga. Føroya Rættur hevur tó givið tí gætur, at týdningarmiklir partar av uppskotinum hava verið umrøddir við Justitsministeriet.

Føroyar Rættur mælir til, at tað í viðmerkingunum greitt verður víst á, hvørjar danskar broytingarlógir, sum uppskotið byggir á.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at viðmerkingin er tikin til eftirtektar og tað nú greitt framgongur hvørjar danskar broytingarlógir, sum uppskotið byggir á.

Føroyar Rættur ger vart við, at formliga heitið hjá rættinum framgongur av rættargangslógini, og at hetta er "Retten på Færøerne" og ikki "Føroya Rættur".

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at "Retten på Færøerne" vanliga verður nevndur "Føroya Rættur" og at hetta reint málsliga situr betur, og er tað sama. Løgmálaráðið heldur tí fast við heitið "Føroya Rættur".

LM-016/2023